## OSS – feilsøkjan **Installatión og Dagføring.**

1. Mín telefon er byrja at brúka nógvan streym, tá eg brúki appina??
   SVAR: Appin brúkar sera lítið av streymi, men á nøkrum, serliga á eldri telefonum, kann man uppliva, at tað hendur. Um so er, so skal man prøva at fjerna appina av telefonini og taka hana niður aftur.
2. Tá eg skal heinta appina,so skal eg tøppa mítt apple ID inn. Hvar finni eg tað og hvat er mín koda ?
   SVAR: Tú skalt altíð brúka tína kodu til appleID, tá tú skalt heinta appir í App Store. Tað hevur onki sum so, við appina FirstAED, at gera. Títt appleID er allarhelst tín teldupostaddressa, men tað finnur tú útav inni á "Indstillinger". Far í tann ovasta bjálkan, har sum títt navn stendur í. Her sært tú tað teldupostaddressu, sum er títt appleID. Loyniorði er persónligt og hevur onki við okkum at gera, men um tú ikki minnist loyniorði, so kanst tú fara inná "Adgangskode og sikkerhed". Trýst á "Skift adgangskode". Tú kanst eisini fara inná : https://appleid.apple.com/#!&page=signin
3. Eg eri við at installera appina, men hvat er mítt brúkari og loyniorð ?

   SVAR: Tú mast skráseta teg fyrst, tað ger man her : https://rfl.fo/meldatil/ Tá tú so hevur skrásett teg, so fært tú eitt sms, við tínum brúkaranavni, loyniorði og servara kodu

4. Hvussu síggji eg, um eg havi røttu dagføringina, av appini ?

   SVAR: Far regluliga inná appstore ella playbutik, fyri at kanna um nøkur dagføring liggur og bíðar

5. Eg fái ikki installera appina og nýtt brúkararanavn og loyniorði, sum eg havi fingið sendandi ?

   SVAR: Hettar kann vera ordaka av at, tú hevur eina eldri telefon, sum skipanin ikki byggjur á. iPhone skal vera min.  4s ella nýggjari og Android skal vera min.  5.

6. Hví byrjar appin, mína staðseting í Rom ella Frankaríki ?

   SVAR: Hettar er bert tá tú tendrar appina. Appin skal líka finna tína staðseting.

Útkall

9. Í einum útkalli, fer sambandi bráðliga. Hvat geri eg ??

   SVAR: Tað kann gott henda, um tú ert á WiFI heima, og so fer út og fær 4 G. Tað gongur ein løtu, í skiftinum frá WIFI og til 4 G. Tað kann eisini henda, um tú kemur í eitt økið, við vánaligum ella ongum 4 G. Tað kann vera eitt hugskot at taka eina løtumynd av skerminum. Minst bara til at sletta myndina aftaná, tí tú hevur ikki lov at goyma hesar, vísandi til Persónsdátavernd.

10. Hví fái eg ikki eitt útkall?
    SVAR: Tað kann vera fleiri orsøkir. Men tann mest vanliga er, at man hevur ikki appina koyrandi. App`in skal altíð koyra í bakgrundini. Um tú yvast, um hvussu tú ger tað, far so inná vegleiðingar á heimasíðuni www.rfl.fo
    Ein onnur orsøkk kann vera, at tú hevur ikki dagført appina. Far inná App Store ella Play Butik og kanna eftur, um har er nøkur dagføring til appina.

11. Eg havi fingið eitt útkall, men eg havi ikki hoyrt tónan?
    SVAR: Tað kunnu vera 2 grundir til hettar. 1. Tú hevur ikki ljóði á MAX. Far inná appina og koyr síðani ljóði frá, við at brúka volumu knapparanar á síðuni á telefonini.. 2. Du har ikke sat telefonina á “vedvarende” í ”Indstillinger” og ”Meddelelser” – Um tú yvast, so far inná Vegleiðingar á www.rfl.fo

12. Hví síggji eg ikki, hvat eg veri send/ur til, tá útkalli kemur ? Tað hevði veri gott, um man kundi fyrireika seg mentalt ?.
    SVAR: Tað eru fleiri orsøkir til hettar. 1. Um tú ikki verður send/ur til neyðstaði, so skalt ´tu heldur iki hava møðuleika til at síggja bústaðin ella boðini, tí um tú ert ikki ert boðsendur, so hevur tú onki at brúka hesar upplýsingar til. 2. Um tú verður send/ur, so er tað avmarka, hvussu nógv man kann fyrireika seg mentalt uppá 20-25 sec. Tað er betur at brúka tíðina uppá at tryggja sær, at man hevur vestin og lummamaskuna uppi á sær og fara í bilin ella gera seg kláran at renna. Tí so ert tú til reiðar, um tú verður vald/ur. 3. Tíðin hevur víst at nógv velja at trýsta á JA ella NEI, útfrá hvat boðini eru. Hettar er ikki rættur framferðar háttur, tí sum neyðhjálpari hevur tú fyrstuhjálparskeið og hevur fingið upplæring í, tær støður man kann koma til.

13. Eg fái ongin útkøll og eg fái ikki svar uppá mína trupuleikar í nøkrum av tí sum longu er nevnt longur uppi ??
    SVAR: Tá Apple ger eina av teirra størri ella minni dagføringum, kann hettar í summun førum merkja, at summar telefonir fella úr skipanini. Um tú ert út fyri hesum, so vilja vit sera fegin frætt frá tær, so at vit fáa gjørt neyðugu broytingarnar til appina. Vinaliga send okkum ein teldupost á rfl@rfl.fo